## Burkabannið slept



Í Danmark hava Tey Konservativu slept tí nógv umtalaða uppskotinum um at banna muslimskum kvinnum at ganga í burka-búna. Uppskotið elvdi til nógv kjak, og hin stjórnarflokkurin, Vinstri, gjørdi alt fyri eitt greitt, at hann fór ikki at taka undir við einum tílíkum uppskoti. Tað sama segði andstøðan í Fólkatinginum. Nú hevur løgmálaráðið so boðað frá, at uppskotið kann illa sameinast við donsku grundlógina og ST-sáttmálan um mannarættindi, og tí hava Tey Konservativu slept uppskotinum, skrivar Ritzau.

## Norwegian ger um seg

Norska lágprísflogfelagið Norwegian, sum hevur staðið seg sera væl í kappingini við onnur flogfeløg, ætlar sær nú at brúka floghavnina í Kastrup sum miðdepil í sínum rutukervi. Tað sigur stjórin, Julius Støback, við Jyllands-Postin. Sambært stjóranum er ætlanin hjá Norwegian at gera Kastrup til ein lágprísmiðdepil fyri flúgving í Norðurlondum og at flyta ferðafólk úr Noreg og Svøríki umvegis floghavnina í danska høvuðsstaðnum. Jyllands-Posturin skrivar, at verður ætlanin hjá Norwegian sett í verk, fer hon at herða kappingina við SAS, sum longu brúkar Kastrup sum miðdepil í sínari flúgving.

# Nú skal handlast á ferðavinn



*Landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum, Jørgin Niclasen og Súsanna Sørensen, leiðari á ferðavinnudeildini hjá uttanríkisráðnum á ferðavinnustevnu í Keypmannahavn*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tilboðini í Føroyum eru mong, og vit síggja á hvørjum ári nýggj og spennandi tilboð av ymiskum slagi. Vit eiga ikki longur at tosa um, hvørt okkum vantar eitt wc í Svínoy – ella ein handil í Gásadali. So hvørt, sum ferðafólkini í enn størri tali fara at koma higar, koma fasilitetirnir og tilboðini eisini. Tað sigur Jørgin Niclasen, sum mælir til, at 9 miljónir krónur verða brúktar um árið í trý ár til at fáa útlendsk ferðafólk at koma higar – og at fáa føroyingar í enn størri mun at ferðast í egnum landi**

TRAVEL MART
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fyrrapartin í gjár var eitt seminar hildið í Planetarium í sambandi við Vestnorden Travel Mart, og klokkan 14 læt framsýningin upp á Scandic Copenhagen. Ferðavinnustevnan letur aftur klokkan 17 í dag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Jørgin Niclasen, landsstýrismaður í ferðavinnumálum, er sannførdur um, at vegurin fram hjá føroysku ferðavinnuni er at brúka nógv meira pening til at marknaðarføra okkum uttanlands. Hann heldur tó ikki, at Føroyar kunnu brúka sína fíggjarligu orku hvar sum helst úti í heimi, men at vit eiga at velja út eini 3-4 lond, sum vit í fyrsta lagi eiga at satsa upp á. Hvørji hesi lond skulu verða, og hvørjar málbólkar vit eiga at leggja okkum eftir at fáa hendanvegin, eigur politiski myndugleikin í samráð við føroysku ferðavinnuna at finna fram til.

- Vit hava ongan møguleika at lýsa við dýrum lýsingum á teimum stóru og dýru pallunum kring um heimin, og eg trúgvi heldur ikki, at tað eru slík átøk, sum fáa fólk at vitja okkara oyggjar.

### Velja málbólkar

Jørgin vísir á, at víst vilja vit hava fleiri ferðafólk til Føroya, og sjálvsagt vilja vit hava, at hendan tíðin røkkur yvir ein størri part av árinum.

- Men vit eru eitt lítið land, og tí er tað ikki eitt óavmarkað tal, sum kann koma hendanvegin. Politiski myndugleikin eigur tí saman við ferðavinnuni í Føroyum at finna út av, hvørji fólk vit í fyrsta lagi vilja hava hendanvegin – og úr hvørjum londum.

Hann ásannar, at marknaðarføring kostar pening, men eingin vegur er uttan um. Sama er galdandi hjá tí, sum rekur vinnu. Uttan marknaðarføring verður tú ikki sæddur og kann soleiðis heldur ikki bjóða teg fram, so onnur vita, hvat tú hevur í tínum útboði.

### Ráðharrafundur

Landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum er saman við Súsannu Sørensen, leiðara á ferðamannadeildini í uttanríkisráðnum, við á Vestnorden Travel Mart, sum